bygdu um hetta mundið upp eina modernaða umsiting, har brúk var fyri lógkønum embætismonnum.

## Av lógkønastu monnum

Audun Hugleiksson fekk skjótt sess sum ein tann fremsti ráðgevarin hjá Magnusi Lógbøtara. Magnus setti 1274 í gildi landslógina, eina felagslóg fyri sítt land, eina ta fyrstu av sínum slag í Europa, og *Biskupa søgur* rópa Audun "hinn vitrasta mann til landslaga". Nógv bendir á, at Audun eisini var málkønur, helst hevur hann fingið løgfrøðiliga útbúgving uttanlanda, og kanska hevur hann dugað latín. Sum kongsins ráðgevi kom Audun serliga at arbeiða við lógarmálum, seinni við fíggjarmálum og uttanríkispolitikki. Hann fekk við tíðini mong fín heiti, verður í 1276 nevndur stallari og í 1277 barónur.

Eirikur Magnusson, føddur 1268, kongur 1280-99, var ikki meira enn eitt barn, tá hann tók við sum kongur, og Audun var ein av hansara verjum og ráðgevarum. Borið varð nú so í bandi, at Eirikur skuldi giftast við Margretu, dóttur Aleksandur III, kong av Skotlandi. Kongaligar giftur vóru altíð lið í politiskum ráðagerðum, og á henda hátt fekk Eirikur rætt til Skotlands trúnu, umframt at skotar máttu lata eina stóra heimafylgju. Eirikur og Margreta giftust í 1281, men Margreta doyði longu í 1283, og dóttir teirra, sum eisini æt Margreta, var nú arvingi til bæði Skotlands og Noregis trúnu.

## Eitt nýtt atlantsveldi

Nú verður ein nýggj, ólíka stórfingnari ætlan klakt, ein stórpolitisk ráðagerð, sum fatar um tey trý atlantsríkini Skotland, Noreg og Ongland. Tann blaðunga Margreta Eiriksdóttir skal taka við sum moykongur í Skotlandi og skal samstundis verða trúlovað við Edvardi, soni Edvard I, sum seinni, sum Edvard II, verður kongur í Onglandi. Í kortunum liggur ein spildurnýggj ensk-norsk-skotsk samgonga. Meistarar fyri hesi ætlan eru Edvard I av Onglandi



*Her, á Hegranesi í Jølster, stóð borgin hjá Auduni Hugleikssyni. Gerhard Fischer, sum stóð fyri útgrevstrinum, tók myndina í 1934*

og verðinsmaðurin, tann víðfarni, mál- og lógkøni Audun Hugleiksson.

Men henda ætlan varð av ongum, tí á veg til Skotlands doyði Margreta í Orknoyggjum á heysti 1290. Og aftur broytist tað politiska bílætið: Norðmenn kanna sær Hebridurnar (sum vóru glopnar teimum av hondum við friðinum í Perth í 1266), umframt arvarætt til ta skotsku krúnuna og tað ið eftir var av heimafylgjuni hjá Margretu Aleksandersdóttur, og teir halda seg ikki fáa nóg dyggan stuðul í summum av hesum málum frá Edvardi I. Frakland fer nú at nærkast Noregi, og ein nýggj fronsk-skotsk-norsk samgonga sær dagsins ljós. Eina ferð enn er Audun Hugleiksson virkin aftan fyri leiktjøldini, hesa ferð saman við Filip IV, kongi av Fraklandi.

## Hongdur á Norðnesi

Frakland og Ongland klandraðust um hetta mundið um landspartin Guienne í Suðurfraklandi. Audun Hugleiksson fór til París í 1295, og eftir samráðingar millum hansara og Filip IV varð tann 22. oktober 1295 sáttmáli undirskrivaður millum partarnar. Aftur fyri at fáa 30.000 sterlingpund skuldu norðmenn útvega Fraklandi 300 skip og 50.000 hermenn, at ráða yvir fýra mánar á hvørjum ári.

Partarnir plikta seg somuleiðis til at hjálpa hvør øðrum, um kríggj skuldi brostið á, og her verður týðiliga sipað til Ongland sum fígginda. Audun nevnir seg í hesum sambandi kongsins "baro, consiliarius, secretarius ac nuncius et procurator". Hetta merkir, at hann ikki bara var ráðgevi hjá kongi, men kongsins handgingni trúnaðarmaður. Hann var um hetta mundið eisini skattmeistari hjá Eiriki kongi.

Sáttmálin varð undirskrivaður og er varðveittur á skjalasavni í París. Eisini varð samráðst um, at Hákun hertogi skuldi giftast við tí fronsku greivadóttrini Isabellu av Joigny, og at skotar skuldu lata Eiriki kongi jørð og góðs, hann metti seg at eiga í Skotlandi.

Hetta var krúnan á tí diplomatiska virkinum hjá Auduni Hugleikssyni. Av avtaluni við Filip varð einki, uttan tað at Audun fór heim við einum forskoti upp á 6.000 markar í sterlingvirði. Søgufrøðingar hava undrast stórliga á henda sáttmála, á at Filip læt seg yvirtala og á, at Audun var so framligur at gera avtaluna, tí Noreg hevði ongan møguleika at halda hana.

Fýra ár seinni doyði Eirikur kongur. Tann nýggi kongurin, Hákun Magnusson, var ein sterkari persónsmenska enn beiggin, ráðaríkur, umhyggin eisini í smálutum, kanska eisini hevnissamur, í 1299 var Audun Hugleiksson, kongsins frændi og mætasti ráðgevari, fongslaður, tann 2. desember 1302 varð hann hongdur á Norðnesi, og síðani var hansara góðs inndrigið av krúnuni.



*Á hesum stað á Norðnesi bleiv Eyðun Hestakorn hongdur, sambært íslendskari frásøgn tann 2. desember 1302*

## Kvæði og krimisøga

Orsøkina til hesa hending kenna søgumenn ikki, men tað er greitt, at Hákun miðsavnaði tað politiska valdið og hevði eftirlit við stórmonnum og embætismonnum. At verða hongdur bar vitnisburð um vanæru, og kanska var Audun, sum tann føroyska *Eyðuns ríma* vil vera við, skuldsettur fyri í sínum fíggjarligu atgerðum at hava kraddað meira enn sámiligt var inn undir seg sjálvan.

*Margretu kvæði* er í grundini ein krimisøga, har høvuðspersónurin, Eyðun Hestakorn,